Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini
ÍtróttaSosialin
á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# – Fótbóltur er mítt lív

*Tiltikni málverjin Ray Clemence er ein kempa í enskum fótbólti. Hann hevur spælt fyri Liverpool, Tottenham og á enska landsli›num, og nú er hann málmansvenjari hjá enska fótbóltssambandinum. Í løtuni er hann í Føroyum vi› enska U16 landsli›num*



*– Fótbóltur er ein fantastiskur ítróttur, og eg havi brúkt stóran part av lívi mínum upp á fótbólt. Tá kroppurin so bo›ar frá, at hann ikki klárar at spæla meira, so er ta› frálíkt at kunna ver›a ver›andi innan fótbóltheimin og geva ví›ari ta›, sum eg havi lært og uppliva›, sigur Ray Clemence.*

Mynd: Jonhard Hammer

EY›UN KLAKSTEIN

Hann telist millum størstu nøvnini í enskum fótbólti, og framvegis hevur hann t‡›andi leiklut innan fótbóltsspæli› í Onglandi.

Heimskendi bretski málverjin, Ray Clemence, er í hesum døgum at síggja í føroyska høvu›ssta›num, higar hann er komin vi› enska U16 fótbóltslandsli›num, sum luttekur í NM-kappingini, sum hevur veri› í Gundadali alla vikuna.

Ray Clemence var málverji í Liverpool, tá felagi› var ta› mest vinnandi í enskum fótbólti í sjeytiárunum. Í 1981 flutti hann til Tottenham, har hann spældi til 1988. Clemence var eisini á enska landsli›num 61 fer›ir til hann í 1983 gavst á landsli›num.

Í dag er Ray Clemence í starvi hjá enska fótbóltssambandinum, har hann hevur stóru uppgávuna at venja og halda eyga vi› øllum teimum málverjum, sum kunnu koma á ensk landsli›. Hann venur teir bestu, sum spæla á enska A-landsli›num, og hann hann venur eisini teir ungu og lovandi, sum spæla á U16 landsli›num.

Mikudagin hitti Sosialurin kenda enska málverjan á Hotel Føroyum, har øll tey útlendsku fótbóltsli›ini, sum eru vi› í NM-kappingini, búgva. Vit tosa›u vi› hann um arbei›i› sum málmansvenjari, um hansara dagar í Liverpool-málinum og um hvørjar eginleikar ein málverji í nútímans fótbóltsspæli skal hava.

## Bæ›i ungar og royndar

– Fótbóltur er ein fantastiskur ítróttur, og eg havi brúkt stóran part av lívi mínum upp á fótbólt. Tá kroppurin so bo›ar frá, at hann ikki klárar at spæla meira, so er ta› frálíkt at kunna ver›a ver›andi innan fótbóltsheimin og geva ví›ari ta›, sum eg havi lært og uppliva›, sigur Ray Clemence.

Uppgávan í Føroyum er saman vi› U16 landsli›num, men í summar var Ray Clemence partur av enska landsli›num, sum spældi vi› í EM-endaspælinum í Belgia og Hollandi. Har var uppgávan at venja landsli›smálverjarnar David Seaman og Nigel Martyn.

– Seaman og Martyn eru ávíkavist 36 og 33 ára gamlir, og teir hava nógvar royndir. Tí kann eg ikki læra teir naka›, men eg kann syrgja fyri, at teir eru væl fyri. Teir ungu málverjarnir skulu allatí›ina læra naka›, me›an teir, sum spæla á A-landsli›num, skulu halda málmansspæli› vi› líka, grei›ir Ray Clemence frá.

Uppgávurnar hjá einum málmanni eru nógvar, men í grundini sn‡r ta› seg um at for›a mótstø›umonnunum í at gera mál.

– Málmenn skulu duga at brúka hendurnar, tí ta› nyttar einki at tora at tveita seg ni›ur fyri føturnar á álopsspælarum ella upp í málhorni›, um endin á øllum er, at tú ikki klárar at taka bóltin ella fáa hann burtur. Hendurnar eru t‡dningarmiklar.

– Tá vit tosa um altjó›a fótbólt, so er konsentratiónin eisini sera t‡dningarmikil, og málmenn skulu taka røttu avger›irnar. Í altjó›a fótbólti hava málmenn sjáldan nógv at gera, men tá ta› er okkurt at gera, so mugu teir taka røttu avger›irnar.

## Tær størstu løturnar

Ray Clemence hevur sjálvur roynt alt ta›, sum hann tosar um. Hann hevur spælt nógvar avgerandi dystir, bæ›i í Onglandi og í altjó›a fótbólti vi› Liverpool og enska landsli›num. Men í grundini ætla›i hann sær ikki at vera málverji.

– Eg ætla›i ongantí› at gerast málverji, og eg stó› ikki í málinum, fyrr enn eg gjørdist 15 ára gamal. Eg byrja›i sum áleypari og enda›i sum verjuspælari. Ein dagin mangla›i li›i›, sum eg spældi á, ein málverja, og venjarin helt, at eg skuldi royna meg, og alt kom bara natúrliga eftir ta›.

– Fólk plagdu at siga, at ta› er eingin spennandi uppgáva at vera málverji, og ta› plagdi ta› kanska ikki at vera, men ta› er ta› nú. Málmenn vinna dystir fyri síni feløg og landsli›, og vi› brotssparkskappingnum hava teir eisini fingi› ein stóra uppgávu. Teir kunnu blíva hetjur, um teir gera bjargingarnar.

Á›renn stóru tí›ina í Liverpool í sjeytiárunum, spældi Ray Clemence í tvey ár í 3. deildarfelagnum Scunthorpe. Har fekk tiltikni venjarin hjá Liverpool, Bill Shankly, eyga á Clemence, og eftir at hava fylgt honum í eina tí›, avgjørdi Liverpool at keypa hann fyri 140.000 krónur.

Hetta var í 1967, og eftir ta› fylgdu 14 framúr ár í Liverpool, har Clemence helst var kendasta navni› á Liverpool-li›num.

– Tey 14 árini í Liverpool góvu mær mínar størstu løtur innan fótbólti. Eg spældi saman vi› nógvum gó›um spælarum, og vit vunnu nógv. Um eg skal peika á tí›arskei›, sum var ta› besta, so má ta› var í 1977, tá vit innan 10 dagar spældu tríggjar avgerandi dystir. Vit vunnu meistaraskapin leygardag, taptu sí›ani steypafinaluna leygardagin eftir, og mikudagin vunnu vi› Europa Cup fyri meistarali›, grei›ir Clemence frá.

– Hesir dagarnir góvu mær alt, sum fótbóltsspæli› kann geva. Tann stóra gle›in at vinna, sí›ani vónbroti› at tapa, og sí›ani uppgávan at taka seg saman aftur og vinna tann størsta sigurin. Ta› var ótrúliga spennandi og stuttligt – eisini veitslan eftir Europa Cup sigurin, leggur hann aftur at flennandi.

– Hana fara allir teir, sum vóru vi›, at minnast fyri lívi›, sigur hann uttan at koma vi› eini nærri frágrei›ing.

## Finalan gjørdist ein vanligur dystur

Í Liverpool spældi Clemence 656 dystir, og í 335 av hesum dystum helt hann máli› reint.

– Eg hev›i gó›ar spælara rundan um meg. Vit kendu væl hvønn annan, bæ›i styrki og veikleikar, og av tí at vit høvdu so gott li›, brúktu vit meginpartin av tí›ini á hálvuni hjá mótstø›uli›unum.

Clemence var› einafer› endurgivin fyri at siga, at vi› hvørt iva›ist hann í, um hann var› ynsktur á Liverpool-li›num. Hann hev›i so líti› at gera, at slapp hann at gera 3-4 bjargingar í einum dysti, so hev›i hann havt nógv at gera.

– Eg hev›i gó›ar verjuspælarar frammanfyri meg, men eg hev›i eisini gó›a konsentratión. Tá eg í einum dysti skuldi gera onkrar bjargingar, so skuldi eg eisini gera tær. Og ta› leggi eg framvegis stóra vekt á – málmann skulu vera klárir og teir skulu konsentrera seg allan dystin.

Í 1981 flutti Clemence úr Liverpool og til Tottenham, har hann sí›ani spældi til hann gjørdist 39 ára gamal.

– Seinasti dysturin hjá mær í Liverpool var Europa Cup finalan ímóti Real Madrid í 1981. Dysturin var spældur í Paris, og frammanfyri 50.000 ásko›arum vunnu vit 1-0. Fólk trú›u ikki sínum egnu oyrum, tá tey hoyrdu, at eg skuldu flyta úr Liverpool eftir ein slíkan dyst.

– Men eg tók avger›ina í skiftirúminum eftir hendan dystinum, tí me›an spælararnir drukku sjampanju og vóru í gó›um lag, uppfata›i eg ta› heila sum ein vanligan dyst. Tá ásanna›i eg, at eg hev›i brúk fyri n‡ggjum avbjó›ingum fyri at fáa meira burtur úr persónliga. Tá ein europeisku finalan ver›ur bara ein vanligur dystur fyri teg, so ver›ur tú noyddur at leita eftir eini n‡ggjari avbjó›ing onkra a›rasta›ni, og ta› gjørdi eg í Tottenham.

Í Tottenham var Ray Clemence vi› til at vinna ensku steypakappingina, og í 1984 vann Tottenham UEFA Cup kappingina. Men annars vóru sigrarnir ikki at samanlíkna vi› ta›, sum hann hev›i vunni› í Liverpool.

Clemence spældi 61 landsdystir á enska landsli›num, og ta› gjørdi hann samstundis, sum hann kappa›ist vi› eitt anna› kent navn, Peter Shilton. Í 1983 gavst Clemence á landsli›num, og tá høvdu hann og Shilton spælt nøkunlunda líka nógvar landsdystir. Shilton helt fram á landsli›num, og hann spældi samanlagt yvir 120 landsdystir.

– Um annar av okkum ikki var málverji, so hev›i hin spælt so nógvar landsdystir, sum eingin hev›i kunna› samanlíka seg vi›, heldur Clemence.

## Fri›arligt í Føroyum

Hóast hann hevur fer›ast nógv, er hetta fyrsta fer›in, at Ray Clemence er í Føroyum.

– Mær dámar væl her. Eg havi skilt á lagnum, at tit hava ikki havt slíkt turrve›ur í 100 ár, so eg havi ver› heppin. Hitin hevur veri› gó›ur, og ta› hevur veri› líti› av vindi. Fólk eru sera fyrikomandi og blí›, og her er so fri›arligt og vakurt.

– Vit gingu ein túr í b‡num í dag, og ta› er munur á her og í London, har eg búgva. Har gongur alt so skjótt fyri seg, fólk eru stressa› og havi ikki stundir til naka›. Her tykist alt at ganga eitt sindur spakuligari fyri seg, sigur hann.

Hóast hann hevur nógv ár á baki innan fótbólt, so ætlar hann sær at halda fram. Í løtuni er hann málmansvenjari, men hann útilokar ikki, at hann einafer› í framtí›ini ver›ur venjari hjá onkrum felagi í Englandi.

– Fótbóltur hevur veri› mítt lív, so einfalt er ta›. Eg elski fótbóltsspæli› og ynski framvegis at vera ein partur av tí vi› øllum tí, sum fylgir vi›.

– Ta› er ein ítróttur, sum fer vi› nógvari tí›, og fótbólturin leggur nógvar for›ingar fyri tínum vanliga sosiala lívi, tí tú ert nógv burturstaddur og tú hevur ongantí› frí um vikuskiftini. Og sjálvt tá tú ert venjari, mást tú offra naka›. Men eg havi fingi› nógv burtur úr at vera fótbóltspælari, eg havi lært nógv, fer›ast kring heimin, og eg møtt nógvum fólki, sum eg annars ikki hev›i møtt, sigur Clemence.

Í morgin fer hann heimaftur til Onglands, og tá kann hann samstundis halda sín fø›ingardag nummar 53.

Málmanskempan úr Onglandi.





*Ray Clemence vardi máli› hjá Liverpool, tá felagi› var ta› mest vinnandi í enskum fótbólti í sjeytiárunum. Hann spældi eisini í Tottenham og 61 fer›ir á enska landsli›num*



*– Tey 14 árini í Liverpool góvu mær mínar størstu løtur innan fótbólti. Eg spældi saman vi› nógvum gó›um spælarum, og vit vunnu nógv, sigur tiltikni málverjin úr Onglandi.*